LM-017/2020

Annika Petersen

Fra:	Katrina Maria Johannesen
Sendt:	30. januar 2020 19:51
Til:	VMR-Journal
Cc:	Jógvan Thomsen; Gudmundur Nónstein
Emne:	Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin)
Vedhæftede filer:	Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin).pdf

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið,

Viðfest er hoyringarsvar frá Tryggingareftirlitinum til *Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin).*

Vinarliga / Best regards

Katrina Maria Johannesen
Ráðgevi/Adviser

Tryggingareftirlitið

Insurance Authority
Skálatrøð 20
P.O. Box 73
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel. +298 35 60 27
Mob. +298 55 60 27
Fax +298 35 60 35
www.tryggingareftirlitid.fo

Tryggingareftirlitið

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn 30. januar 2020
Journalnr.: 20/00010-3

Att. Sørin Pram Sørensen

Tykkara j.nr. 19/00515

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin)

Tryggingareftirlitið hevur hesar viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin):

1 § 2, nr. 11

Í § 2, nr. 11 í uppskotinum verður hugtakið "tómt bankafelag" allýst. Allýsingin av einum tómum bankafelag í uppskotinum svarar til eina "deilmongd" av innihaldinum í allýsingini í donsku hvítvasklóginí[1] § 2, nr. 11. Sostatt kann tað tykjast sum um, at eitt hol er í allýsingini av einum tómum bankafelag í uppskotinum (og § 2, nr. 11 í anordningshvítvasklóginí) um samanborið verður við allýsingina í donsku hvítvasklóginí. Hetta kann møguliga hava týdning eitt nú í mun til § 19, stk. 1 í uppskotinum. Mælt verður til at kanna hetta nærri.

2 § 7, stk. 3

I § 7, stk. 3 í uppskotinum verður mælt til at broyta orðingina: ", eru fullgóð." til samsvarandi orðingina í donsku hvítvasklóginí § 8, stk. 3, ið er soljóðandi: », er effektive samt kontrollere, at virksomheden underretter Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet i henhold til § 26, stk. 1 [FO hvítvasklóg § 25, stk. 1].«.

3 § 7, stk. 4

Í § 7, stk. 4 í uppskotinum verða orðingarnar: "innanhýsis egi eftirlit" og "innanhýsis eftirlitið" nýttar fyri lyklafunktiónina, ið á donskum verður nevnd: "Den interne auditfunktion", ið er ein av teimum 4 lyklafunktiónunum, ið eru nevndar í leiðslukunngerðini fyri tryggingarfeløg[2]. Mælt verður til at nýta orðingina: "innanhýsis auditfunktión".

4 § 29, stk. 1

Í § 29, stk. 1 í uppskotinum verður mælt til at strika orðið "øðrum" (EU- ella EBS-landi). Somuleiðis verður mælt til at nýta ES-land í staðin fyri EU-land.

5 §§ 32, stk. 1 og 33, stk. 1

Í §§ 32, stk. 1 og 33, stk. 1 í uppskotinum er ongin tilvísing til § 1, stk. 1, nr. 4 eins og í donsku hvítvasklóginí, ið vísir til § 1, stk. 1, nr. 8, ið er soljóðandi: *"Øvrige virksomheder og personer, der*

[1] LBK nr. 930 af 06/09/2019
[2] Kunngerð nr. 1 frá 27. Juni 2018 um leiðslu og stýring av tryggingarfeløgum o.ø.

erhvervsmæssigt udøver en eller flere af aktiviteterne som nævnt i bilag 1, jf. dog stk. 4." Hetta merkir eitt nú, at Realurin ikki er fevndur av nevndu ásetingum.

Mælt verður til at meta um tørvur er á at nágreina ásetingina.

6 § 33, stk. 3

Sambært § 33, stk. 3 í uppskotinum kunnu starvsfólk, hvørs rættindi eru brotin við at brot er framt á stk. 1 (whistleblower-skipanin) og 2 (fráboðan til SOIK) fáa játtað eitt endurgjald. Endurgjaldið verður ásett vit atliti at tíðini, starvsfólki hevur verið í starvi, og umstøðurnar í málinum annars.

Í donsku hvítvasklógini § 36, stk. 3 verður nágreinað, at: *"ved overtrædelse af stk. 1 og 2, kan tilkendes en godtgørelse i overensstemmelse med principperne i ligebehandlingsloven."*

Í serligu viðmerkingunum til donsku ásetingina stendur m.a., at:

"Godtgørelsen kan ikke fastsættes efter almindelige erstatningsretlige regler, da den ikke skal modsvare et tab for lønmodtageren. Der er ikke fastsat et maksimum for godtgørelsen, men denne fastsættes af domstolene og voldgiftsretterne under hensyntagen til den ansattes ansættelsestid og den enkelte sags omstændigheder, herunder med iagttagelse af det EU-retlige effektivitetsprincip. Godtgørelsen skal dække den ikke-økonomiske skade, den ansatte har lidt, jf. herved princippet i § 26 i lov om erstatningsansvar. En eventuel godtgørelse er dog ikke til hinder for, at den ansatte modtager erstatning for et økonomisk tab, forudsat at betingelserne i henhold til de almindelige erstatningsretlige regler er opfyldt.

Den ansatte kan ikke få ret til godtgørelse i medfør af flere forskellige regelsæt for samme hændelse. Det samme gør sig gældende, hvis den ansatte er berettiget til en godtgørelse i henhold til overenskomster og andre arbejdsretlige aftaler. I forbindelse med fastsættelse af godtgørelsen skal domstolene tage udgangspunkt i praksis efter § 16, stk. 3, i ligebehandlingsloven."

Mælt verður til, at meta um tørvur er á at nágreina ásetingina og serligu viðmerkingarnar til § 33, stk. 3 í uppskotinum, ið ikki geva nakað tulkingarískoyti annað enn at vísa til tær donsku viðmerkingarnar til § 36 í hvítvasklógini, ið vísa til m.a. det EU-retlige effektivitetsprincip og § 16, stk. 3 í donsku ligebehandlingsloven.

7 § 36, stk. 1

Sambært § 36, stk. 1 í uppskotinum skal Tryggingareftirlitið hava eftirlit við fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av § 1, nr. 1-5. Talan er um hesar fyritøkur og persónar:

1) Realkredittstovnar.
2) Lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar.
3) Tryggingarmeklarar, tá hesir miðla lívstryggingar ella aðrar íløgurelateraðar tryggingar.
4) Aðrar fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi veitan av lánum við skrásettum panti í fastogn ella í skipum við støði í útgávu av lánsbrøvum, sbr. tó stk. 3.
5) Deildir hjá útlendskum fyritøkum, útbýtarir/útdeilarar og umboðsfólk her í landinum, tá hesar útinna virksemi eftir nr. 1- 4.

Kostnaðurin av at reka Tryggingareftirlitið verður, sbrt. § 207 í tryggingarlógini, rindaður við avgjøldum frá teimum fyritøkum, ið eru undir eftirliti sbrt. §§ 208-212 í tryggingarlógini. Serstøk heimild er fyri P/F Lív Lívs- og pensiónstryggingarfelag (Lív 3), ið rindar 5,5% av kostnaðinum, sbrt. § 1, stk. 1 í kunngerð

nr. 15 frá 9. mars 2016 um avgjald til Tryggingareftirlitið fyri eftiransan av løgtingslóg um P/F Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag.

Tryggingareftirlitið hevur harumframt eftirlit við ásetingunum í kapittul 3 og 4 løgtingslóg nr. 75 frá 5. november 1998 um Føroya Realkreditstovn (Realin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 123 frá 7. desember 2012. Kostnaðurin fyri hetta eftirlit verður rindaður av Realinum. Gjaldið er 500 kr. pr. tíma, sbrt. § 5 í reglugerð frá 30. november 2015 fyri uttanhýsiseftirlit við Føroya Realkreditstovni. Gjald fyri eftirlit við hvítvasklógini er ikki fevnt av reglugerðini.

Kostnaðurin fyri eftirlit við teimum í § 1, stk. 1, nr. 1-5 er ikki viðgjørdur í uppskotinum. Hetta merkir eitt nú, at fyritøkur og persónar fevnd av § 1, stk. 1, nr. 4, undir hesum Realurin, ikki skulu gjalda nakað av kostnaðinum hjá Tryggingareftirlitinum at hava eftirlit við hvítvasklógini.

Mælt verður til, at áseta nærri reglur um gjald fyri eftirlit við hvítvasklógini.

8 § 48 í donsku hvítvasklógini

Í donsku hvítvasklógini er skrásetingarskylda hjá fyritøkum og persónum, sum eru fevnd av § 1, stk. 1, nr. 8, ið er soljóðandi:

*"**§ 48.** Virksomheder og personer omfattet af § 1, stk. 1, nr. 8, skal registreres hos Finanstilsynet for at kunne udøve de aktiviteter, der er nævnt i bilag 1.*
Stk. 2. Finanstilsynet skal undlade at foretage registrering efter stk. 1, hvis et medlem af virksomhedens øverste eller daglige ledelse eller personen er dømt for et strafbart forhold, der begrunder en nærliggende fare for misbrug af stillingen eller hvervet, jf. straffelovens § 78, stk. 2.
Stk. 3. Finanstilsynet skal endvidere undlade at registrere en virksomhed, hvis virksomheden er dømt for et strafbart forhold, der begrunder en nærliggende fare for misbrug af registreringen, jf. straffelovens § 78, stk. 2, eller en reel ejer er dømt for et strafbart forhold, der begrunder en nærliggende fare for misbrug af den pågældendes kontrollerende indflydelse.
Stk. 4. Ved Finanstilsynets vurdering i henhold til stk. 2 og 3 finder straffelovens § 78, stk. 3, tilsvarende anvendelse.
Stk. 5. Finanstilsynet kan inddrage registreringen af en virksomhed eller en anden juridisk person foretaget efter stk. 1, hvis et medlem af virksomhedens øverste eller daglige ledelse eller personen efterfølgende omfattes af stk. 2, eller hvis virksomheden eller en reel ejer efterfølgende omfattes af stk. 3.
Stk. 6. Finanstilsynet kan inddrage registreringen af en virksomhed eller en person efter stk. 1, hvis virksomheden eller personen gør sig skyldig i grove eller gentagne overtrædelser af denne lov."

Í uppskotinum til hvítvasklóg er ongin tílík skrásetingarskylda ásett fyri fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av § 1, stk. 1, nr. 4.

Mælt verður til, at tað verður kannað nærri, um samanfall er millum virkisøki í § 1, stk. 1, nr. 8 í donsku hvítvasklógini og § 1, stk. 1, nr. 4 í uppskotinum. Um so er, eigur at verða mett um tørvur er á, at áseta líknandi reglur um skráseting, sum eru í donsku hvítvasklógini § 48 og § 52.

9 § 41, stk. 2

Í § 41, stk. 1 í uppskotinum verður ásett, at Tryggingareftirlitið kann geva fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-5, boð um at almannakunngera rættleiðandi upplýsingar. Í stk. 2 í uppskotinum verður víst til § 1, stk. 1, nr. 1-4 og nr. 6. Sostatt er ikki samsvar millum tær fyritøkur og persónar, ið verða nevnd í stk. 1. og stk. 2.

Mælt verður til at rætta tilvísingina í § 41, stk. 2.

10 § 42, stk. 1 og § 49, stk. 1

Í § 42, stk. 1 í uppskotinum verður orðið "boð" nýtt meðan "tiltøk" verður nýtt í § 49, stk. 1. Í donsku hvítvasklógini verður hugtakið "reaktioner" nýtt. Sambært serligu viðmerkingunum til donsku hvítvasklógina § 55 (§ 48 í lógaruppskotinum), so fevnir hugtakið "reaktioner" um:

"Begrebet reaktioner omfatter alle de reaktioner, som Finanstilsynets bestyrelse eller Finanstilsynet efter delegation fra Finanstilsynets bestyrelse varetager, og som retter sig mod en part, herunder afgørelse, påbud, påtaler og beslutninger om at overgive sager til politimæssig efterforskning."

Orðið "boð" svarar til donsku orðingina "påbud" og fevnir tískil ikki um allar tær omanfyri nevndu reaktiónir.

Mælt verður til at nágreina ásetingina í § 42, soleiðis at hon er í samsvar við § 55 í donsku hvítvasklógini. Somuleiðis verður mælt til at gera neyðugar konsekvensrættingar í uppskotinum.

11 § 42, stk. 2

Í § 42, stk. 2 í uppskotinum eru fleiri tilvísingar til aðrar ásetingar í uppskotinum. Allar hesar tilvísingar tykjast ikki at vera rættar. Mælt verður til at eftirkanna tilvísingarnar.

12 § 42, stk. 6

Ásetingin í § 42, stk. 6 í uppskotinum er innihaldsleys.

Mælt verður til at samanbera § 42 í uppskotinum við donsku hvítvasklógina § 55 og eftirkanna, um nøkur stk. í donsku ásetingini mangla í § 42 í uppskotinum.

13 § 43, stk. 3, nr. 2

Í § 43, stk. 3, nr. 2 í uppskotinum verður víst til § 55 um samstarvsbólk. Rætta ásetingin um samstarvsbólkin er í § 54.

14 § 43, stk. 3, nr. 14

Í § 43, stk. 3, nr. 14 í uppskotinum verður ásett, at tagnarskyldan hjá Tryggingareftirlitinum ikki er til hindurs fyri at upplýsingar kunnu verða latnar til danska fíggjarmálaráðharran. Mælt verður til, at upplýsingar eisini kunnu verða latnar landsstýrismanninum í fíggjarmálum eins og í tryggingarlógini § 200, stk. 6, nr. 16.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein